# ítróttur

Nr. 219 • týsdagur • 15. november 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## Neistin og VÍF í annaðkvøld

Ein dystur í Sunset-kappingini hjá kvinnum verður leiktur á Hálsi í annaðkvøld. Dysturin verður millum Neistan og VÍF. Neistin hevur fingið eina góða byrjan upp á kappingarárið og má metast sum favorittur undan dystinum, men vestmannakvinnur hava eisini bitið væl frá sær í ár. Dysturin verður leiktur klokkan hálvgum sjey mikukvøldið.

**tn**

# Sonni aftur til NSÍ

**Rituvíkingurin Sonni L. Petersen skrivaði í gjárkvøldið undir ein eitt-ára sáttmála við barndómsfelagið NSÍ.**

LEIKARASKIFTI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nú er greitt, at toppskjúttin í fremstu fótbóltsdeildini í 2003, Sonni L. Petersen, komandi kappingarár aftur verður at síggja í gulu og svørtu strípunum hjá NSÍ, eftir at hann seinastu tvey árini hevur leikt við EB/Streymi.

### Vandamikið álop

Harvið kann staðfestast, at vespurnar hava tryggjað sær eitt sera vandamikið álopspar til komandi kappingarár. Umframt Sonna er landsliðsleikarin Christian Høgni Jacobsen eitt av álopsvápnunum hjá runavíkingunum, og harvið eru tað toppskjúttarnir í landskappingini tey bæði seinastu árini, ið skulu mynda NSÍ-álopið komandi kappingarár.

Fyrsta árið á Mølini gjørdist Sonni sum áðurnevnt toppskjútti í landskappingini við 13 málum, men í júst farna kappingarári var úrtøkan ikki tann sama, tí tá gjørdust málini fimm í tali.

Sambært heimasíðuni hjá NSÍ hevur Sonni L. Petersen hava fyrispurningar frá fleiri feløgum, men hann vildi helst spæla við barndómsfelagnum, har eisini beiggi hansara, Helgi L. Petersen, telist millum stuðulsleikararnar.



*Sonni L. Petersen hevur verið ein góður spælari hjá EB/Streymi. Her hevur hann júst skorað móti B36 í Gundadali í summar. Nú er so greitt, at rituvíkingurin komandi kappingarár aftur fer at spæla við barndómsfelagnum NSÍ*

*savnsmynd*

# VB skal aftur samráðast við Sumba

**Á eykaaðalfundi í Vágs Bóltfelag mánakvøldið var stórur meiriluti fyri at kanna møguleikarnar fyri framhaldandi samstarvi við sumbingar, og nú er nýggjur eykaaðalfundur lýstur at vera í VB nú hóskvøldið**

FÓTBÓLTSSAMSTARV
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

*Enn er nakað tíðliga at siga, hvussu verður við framtíðar samstarvi millum VB og Sumba, men ein eykaaðalfundur í VB mánakvøldið samtykti, at samráðingar aftur skulu verða við sumbingar.*

Tað er nógv fundarvirksemi í Vágs Bóltfelag. Mánakvøldið var eykaaðalfundur, og nýggjur eykaaðalfundur er ásettur at vera hóskvøldið 17. november. Tá fáa limirnir í VB høvi til enn eina ferð at taka støðu til, um VB skal samstarva ella ikki samstarva við Sumba um fótbóltsliðini. Í síðstu viku var stórur meiriluti í VB fyri, at samstarvið ikki skuldi halda fram.

### Greiður meiriluti fyri samstarvs-samráðingum

Á skránni til eykaaðalfundin mánakvøldið var val av formanni í fótbóltsdeildini og so ymiskt. Fundarluttakararnir vildu hava málið um samstarv við Sumba viðgjørt, og tí varð beinanvegin farið til ymiskt. VB heimasíðan - vb1905.fo - veit at siga, at tá varð uppskot um at taka upp samstarv við Sumba lisið upp, og eftir kjak varð atkvøtt um, um leiðslan í VB skuldi fáa heimild at fara undir samráðingar við Sumbiar Ítróttarfelag. Hesum tók eykaaðalfundurin undir við. 42 atkvøddu fyri samráðingum um samstarv, 12 atkvøddu ímóti, og ein atkvøða var blonk.

VB formaðurin, John Henrik Holm, boðaði síðani frá, at leiðlsan í felagnum fer undir samráðingar við sumbingar beinanvegin, og at limirnir í VB á eykaaðalfundi hóskvøldið 17. november fara at fáa høvi at taka støðu til úrslitið av samráðingunum við sumbingar.

Formaðurin í Sumbiar Ítróttarfelag, Rúni Lisberg, segði í 3-2 mánakvøldið, at sumbingar nú eru farnir undir at fyrireika seg til at luttaka einsamallir í fótbóltskappingini næsta ár. Hann legði afturat, at teir í Sumba eru klárir at tosa um samstarv við VB, um vágbingar fóru at biðja um tað. Nú hava vágbingar gjørt av aftur at fara at samráðast við sumbingar um samstarv, og eftir øllum at døma ætla vágbingarnir, at samráðingarnar skulu vera loknar hóskvøldið kl. 21.00 , tá ið teir fara at hava enn eina eykaaðalfund. Á skránni fyri tann fundin verður 1) Samstarvið VB/Sumba, 2) Nevndarval og 3)Ymiskt.

# Jón Rói ársins spælari



*At Jón Rói Jacobsen hevur roynst væl í Frem er eingin loyna, og herfyri bleiv hann kosin ársins spælari í felagnum.*

*savnsmynd*

**Valið var væntað og uppiborið, verður sagt í Frem, har teir kjósaðu ársins spælara leygardagin**

ÚTISETAR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Leygardagin varð Jón Rói Jacobsen kosin at vera besti spælarin í hesum árinum í Frem, sum spælir í næstbestu donsku fótbóltsdeildini.

Jón Rói hevur verið støðugur og álitisfullur, og tí var valið rættuliga upplagt, verður sagt í Frem.

Síðani í summar hevur talan verið um nógvar útskiftingar í Frem, har Jón Rói Jacobsen nú telist millum mest royndu spælararnar. Hinir báðir føroyingarnir í felagnum, Gunnar Nielsen og Jónas Þór Næs hava verið meiri á besta liðnum í heyst, enn teir áður hava verið.